# PR-starvsfólk
## til Sjónvarp Føroya

Verandi PR-fólk okkara leitar sær nýggjar avbjóðingar, og tí søkja vit eftir nýggjum fólki til hetta sera spennandi starvsøkið á stovni okkara. Arbeiðið umfatar upplýsing til hyggjararnar og til lýsarar stovnsins.

**Uppgávurnar:** Tú skalt leggja til rættis og framleiða lýsingar um sendingar okkara, leggja til rættis upplýsingartiltøk í sambandi við teir ymisku tættirnar í virksemi sjónvarpsins og hava um hendur dagligu umsitingina av heimasíðu okkara. Tú skalt seta fokus á sendingar okkara og í samráð við leiðsluna leggja strategiina fyri lýsing og marknaðarføring okkara av sjónvarpinum.

Tú verður knýtt/ur at skrádeildini, men kemur harumframt at hava tætt samstarv við marknaðar-deildina. Fyri tann rætta persónin er talan um eitt fjøltáttað og spennandi starv við fjølbroyttum uppgávum og nógvum avbjóðingum.

**Útbúgving og royndir:** Tú hevur útbúgving og /ella royndir innan sjónvarpsframleiðslu og marknaðarføring. Tú hevur so mikið av vitan um grafiska formgeving og sjónvarpsframleiðslu, at tú kanst viðgera og taka støðu til ítøkilig hugskot og geva grafikarum og myndafólki ítøkiligar uppgávur. Tú dugir at hugsa strategiskt og leggja longri upplýsingarátøk til rættis. Tú ert kreativ/ur og hevur lætt við at samstarva.

**Løn og setanartreytir:** Starvið verður sett og lønt sum programmfólkastarv sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálastýrið. Starvið verður sett frá 1. apríl 2003 ella skjótast gjørligt.

Umsóknir við CV, prógvum og viðmælum verða at senda til Sjónvarp Føroya, postboks 21, 110 Tórshavn, og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 28. februar kl. 12.00.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Mikkjal Helmsdal, sjónvarpsstjóra, telefon 340400.

Sjónvarp Føroya, M.A. Winthersgøta 2, 100 Tórshavn



# Stuðul til verkætlanir

Norrønt Atlantssamstarv (NORA) er stovnur undir Norðurlanda Ráðharraráðnum, ið hevur til endamáls at menna og stuðla samstarvi millum Grønland, Føroyar, Ísland og Noreg og grannaøkini hjá hesum londum. Serligur dentur verður lagdur á at uppskotini til verkætlanir koma frá vinnufyritøkunum sjálvum og at sambond vera skapt millum vinnufyritøkur og tey granskingar- og menningarumhvørvi, sum eru í NORA londunum

Verkætlanir sum fremja vinnuligt samstarv, menning og gransking á Atlantsleiðini, verða raðfestar ovast. Dentur verður eisini lagdur á, at verkætlanirnar eru nýskapandi og hava flest møgulig av londunum við í samstarvunum. Stuðul kann veitast til verkætlanir har privat vinnuvirki og stovnar og almennir stovnar og granskingarstovnar samstarva.

Stuðul kann veitast í mesta lagi 3 ár og er treytaður av at onnur fígging fæst til verkætlanina.

Umsókn, skrivað á norðurlendskum máli, eigur at fevna um:

- Stutt yvirlit yvir sjálva ætlanina
- Upphæddina, ið søkt verður um
- Heildarfíggjarætlan, ið vísir, hvørjir stovnar ella einstaklingar taka lut í útreiðslunum og hvussu fígging fæst til vega
- Navn/nøvn á ábyrgdarfólki fyri sjálva verkætlanina

Meira fæst at vita við at venda sær til Norrønt Atlantssamstarv ella við at vitja heimasíðu okkara http: www.nora.fo

Stuðulsumsóknir skulu vera stovninum í hendi í seinasta lagi 1. apríl 2003.

Umsóknir verða sendar til:

**NORRØNT ATLANTSSAMSTARV**
Bryggjubakki 12 · Postboks 259 · 110 Tórshavn
telefon: 353110 · telefax: 353101
e-mail: nora@nora.fo · heimasíða: www.nora.fo



# Virkisbygningur á Hjalla

*2000 m²*

1500 m² eru tøkir til útleigu:
500 m² á 1. hædd *kann nýtast til lagur, verkstað o. líkn.*
800 m² á 2. hædd *verður innrættað eftir ynski, til kontórir o. líkn.*

*Bygningurin er klárur 1. mai 2003.*
*Leigast kann út samlað ella í pørtum!*

*Ring og hoyr nærri!*



*Áhugað kunnu venda sær til:* Hans Dam · Kristiansgøta 40 · FO-188 Hoyvík · Tel 31 85 34 · 21 85 34 · hans-dam@post.olivant.fo



# Frá Føroya Ríðingarfelag

**Ársaðalfundur og veitsla**

Ársaðalfundur verður í felagshúsinum í Havnardali 25. feb. kl. 19.30.

Atgongumerki til 60 ára veitsluna verða seld í felagshúsinum 25. feb. frá kl. 18.00. Atgongumerki kunnu bíleggjast á tlf. 219098.

Veitslan verður í Róðrarnestinum á Argjum 8. mars 2003.

**Nevndin**



# Mist koyrikortið?

**Vikuskiftisskeið til tín ið hevur mist koyrikortið verður fríggjadagin 21. feb og leygardagin 22. feb**



**Eysturoyar Teoriskúli**
**Hugo Kristiansen, tel. 225 225**






Lesið Sosialurin -tað loysir seg




# HEILSANIR



**Hygg her allar gentur kring landið**
Hesin lekri sjeikurin er blivin 18 ár í dag. Ja, so er hann eisini single :o) Tillukku góði, ja, tað er ikki bara sum at siga tað at blíva gamal.
**Heilsan restin**



**Góði pápi, verpápi og allarbesti abbi**
Vit ynskja tær hjartaliga tillukku við 90 ára føðingardegnum, ið var 17. febr. Omma fær eisini eina heilsu, hon hevur føðingardag 19. mars. Guds signing í framtíðini. Vit elska teg.
**Bestu heilsanir vit uppi í Gerðinum og abbadøturnar í Havn**



**Góða Margit**
Hjartaliga tillukku við 2 ára degnum. Vælkomin inn í kjallaran.
**Kærar heilsanir omma og abbi á Toftum**



**Hey Havgrímur**
Tillukku við degnum.
**Heilsan 6A í Venjingarskúlanum**



**Góða elskaða Katarina**
Hjartaliga tillukku við 3 ára føðingardegnum í dag.
**Ynskja omma og abbi í Vestmanna**



Hvat man goyma seg aftanfyri hetta smílið? hhmmmm..... Tillukku góði.
**Heilsan vit á loftinum**



**Góði Aksel**
Hjartaliga tillukku við 7 ára degnum í dag.
**Ynskja omman og abbin**



**Góða fitta Margit**
Hjartaliga tillukku við 2 ára føðingardegnum í dag. Jesus pápi signi teg.
**Kærastu heilsanir Jónas og Malla**



**Hey góða**
Her er tú fitt og deilig. Tillukku við 25 ára degnum.
**Heilsan hehehe**



**Góða omma**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum. Takk fyri alt omma og abbi eru fyri okkum. Klemm frá
**Henning, Martin og Sólveig**



Hahahahaha. Hehehehehe Hohohohoho. Tillukku við 25 ára degnum.
**Hihihihihi**



**Góða elskaða Margit**
Hjartaliga tillukku á tínum 2 ára degi í dag. Vit elska teg. Muss og klemm frá
**Mammu og babba**



**Hey tit bæði**
Hjartaliga tillukku á 18 ára degnum, ið var tann 14. febr. Nú er ikki tíð at sova.
**Heilsan mamma**



**Góðu Rebekka og Karl**
Hjartaliga tillukku við 18 ára døgunum 14. febr. Her eru tit lítil og fitt og enn eru tit líka fitt. Alt gott í framtíðini.
**Ynskja mostir og gubbin**



**Góði Havgrímur**
Tillukku við 25 ára degnum í gjár. Tú heldur tær so væl - er lítið og onki broyttur hesi árini.



**Góði Peter!**
Tað er ein viss broyting farin fram hesi 29 árini og 50 vikurnar. Nú eru einans tvær vikur eftir.
**Vinurin**



**Góði Havgrím**
Hjartaliga tillukku við tí stóra degnum. Her hevur tú fyri einaferð skuld fingið ein ordiligan fong.....
**Heilsan ..........**


## Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur:..........................................................................
..........................................................................
..........................................................................
..........................................................................
..........................................................................
..........................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).

Navn: ..........................................................................
Bústaður: ..........................................................................
Bygd/býur: .................................... Tlf.: ..................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
**Sosialurin**
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«